VIÐMERKINGAR

# Eitt uppskot við trimum tiltøkum til arbeiðsmarknaðin

**Hans Pauli Strøm**
*løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin*



**- eitt arbeiðsmarknaðarráð, ein víðkaður gerðarrættur og ein nýggj semingslóg eru neyðug tiltøk til at fáa góð skipanarlig viðurskifti á føroyska arbeiðsmarknaðin**

Sjáldan hava viðurskiftini á arbeiðsmarknaðin verið so eyðkend av ófriðið, ósemjum og grundleggjandi misáliti partanna millum, sum í hesum valskeiði. Ein høvuðsorsøk til hetta hevur verið tann ágangandi atburðurin frá hesum borgarliga landsstýri móti føroysku fakfelagsrørsluni. Hetta er ávíst í dømi eftir dømi í tíðindaskrivum frá fleiri av teim størstu fakfeløgunum. Serliga eru tað royndirnar hjá landsstýrinum at brúka Fútarættin til at troðka ein arbeiðsrætt ígjøgnum, sum hava staðið fyri skotum.

**Eitt nýtt landsstýri skal til – men tað er ikki nóg mikið**

Ein av fyritreytunum fyri aftur at fáa góð viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum er, at vit sleppa av við hetta fakfelagsfíggindaliga landsstýrið. Men tað er sjálvandi ikki nóg mikið. Eitt nýtt landsstýri noyðist sum eitt av tí fyrsta at skipa ein nýggjan arbeiðsmarknaðarpolitikk, tí tað eru eisini skipanarligir tvørleikar á arbeiðsmarknaðinum sjálvum, sum elva til stríð millum partarnar. Allar hesar drúgvu ósemjurnar, hesar fastlæstu trætturnar, hava elvt til at reisa spurningin, hvat vit kunnu gera fyri at fáa meira positivar og smidligar skipanir á arbeiðsmarknaðinum, sum kunnu fremja konstruktivan dialog millum partarnar og framrættaðar loysnir, heldur enn misálitiskapandi og niðurbrótandi eljustríð.

Bæði í okkara virkisskrá, valskrá og í nógvum greinum hevur Javnaðarflokkurin lagt alstóran dent á ein nýggjan arbeiðsmarknaðarpolitikk. Í hesum umfari skal eg bert vísa á tríggir tættir, sum eru av týdningi í tí orðaskifti, sum hevur verið serliga hesar seinastu vikurnar um royndirnar hjá landsstýrinum sum almennur arbeiðsgevari at brúka Fútarættin til at knúska fakfeløgini við.

**Tað fyrsta er at fáa nýggja semingslóg**

Tað fyrsta sum er neyðugt at gera, at at fáa eina nýggja lóg um seming. Landsstýrið gjørdi eitt uppskot í fjør, men tað var so fullkomiliga kolldømt av fakfeløgunum, at landsstýrið helt seg ongantíð til at leggja uppskotið fyri løgtingið, tíbetur. Eftir tí uppskotinum fekk ein nýggjur semingsmannastovnur so stórt vald, at hann heilt tók partarnar av ræði.

Uppskotið hjá landsstýrinum er óbrúkiligt. Tí skal nevnd setast, umboðandi politiska myndugleikan og partarnar á arbeiðsmarknaðinum, til at gera tær neyðugu broytingarnar. Tað, sum tørvur er á, er ein nýggj semingslóg, fevnandi bæði um tann privata og almenna arbeiðsmarknaðin, sum gevur pørtunum møguleikar sjálvir at loysa ósemjur teirra millum - uttan at politiski myndugleikin ella nakar annar óviðkomandi uttanfyristandandi skal blanda seg uppí og skerja grundlógartryggjaða rásarúmið hjá pørtunum at virka fyri teirra áhugamálum. Semingslógaruppskotið hjá landsstýrinum lúkar ikki hesar treytirnar. Tað miðar móti álvarsliga at skerja virkisfrælsið hjá fakfeløgunum, m.a. við at geva einum nýggjum semingsmannastovni víðar heimildir at kroysta sínar avgerðir niður yvir høvdið á fakfeløgunum, enntá ímóti teirra vilja.

**Tað næsta er at fáa uppskot fram um víðkaðan gerðarrætt**

Tann nevndin, sum eg nevndi omanfyri, skal fáa ein setning aftrat í síni arbeiðsuppgávu: at koma við einum uppskoti til, hvussu vit kunnu skipa og seta á stovn ein víðkaðan gerðarrætt í Føroyum. Endamálið við einum slíkum gerðarrætti – sum fakfeløgini framman undan eru positiv fyri – skal vera at skapa møguleika fyri, at trætur og ósemjur á arbeiðsmarknaðinum skulu kunnu fáa eina skjóta og kvalifiseraða viðgerð, og at ein innihaldslig niðurstøða skal kunna gerast. Hesin gerðarrættur skal tó ikki hava heimild til at døma pørtunum bót, tí so verður hann ikki annað enn eitt slag av tí arbeiðsrætti, feløgini undir ongum umstøðum vilja góðtaka.

Eisini her er longu eitt uppskot at arbeiða út frá, tí fakfeløgini gjørdu longu fyri nøkrum árum síðani eitt uppskot til víðkaðan gerðarrætt, tó uttan at hvørki almennu ella privatu arbeiðsgevararnir vístu tí ans.

**Tað triðja er at seta eitt arbeiðsmarknaðarráð á stovn**

Tað er ikki bara fyri at loysa upp í trætum og ósemjum, at vit hava brúk fyri positivum dialogi og konstruktivum loysnum á arbeiðsmarknaðinum. Tað hava vit eisini brúk fyri til tess at menna okkara arbeiðsmarknað til smidliga at kunna laga seg til tær stóru vinnuligu og tøkniligu broytingar, sum longu eru ígongd, og sum fara at verða uppaftur størri komandi árini. Arbeiðsviðurskifti fara at verða fyri kollveltandi broytingum, viðvíkjandi útbúgvingar- og førleikakrøvum, fakligum innihaldi, fyriskipan á arbeiðsplássunum, fjølbroyting av arbeiðstíðum, lønarstigum o.s.fr. Tað verða rembingar og togan millum yrkisgreinar og fakbólkar. Og ongin man ivast í, at ein oljuvinna av álvara fer at leggja stórt trýst á okkara arbeiðsmarknað.

Men á arbeiðsmarknaði okkara er onki felags forum, ongastaðni, har partarnir seta seg saman at viðgera slík viðurskifti, dagsins mál ella komandi avbjóðingar. Eitt slíkt forum manglar, og ongin ivi er um, at tað er tørvur á tí. Tí vil eg mæla til, at tað verður triðji setningurin í arbeiðsuppgávuni hjá nevndini, sum eg havi nevnt frammanfyri: at koma fram við einum uppskoti um skipa eitt slíkt forum, eitt arbeiðsmarknaðarráð, har partarnir frítt og óbundið koma regluliga saman at viðgera øll viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum, øll viðurskifti sum teir sjálvir, sum gerandisdagurin og komandi avbjóðingar seta á dagsskránna.

Ætlanin við slíkum arbeiðsmarknaðarráði er ikki at fáa eitt organ til taka avgerðir, sum partarnir skulu noyðast at fylgja móti teirra vilja. Endamálið skal tvørturímóti vera at fremja positivan dialog millum partarnar, so at teir sjálvir finna leiðir fram til konstruktivar loysnir. Og arbeiðsmarknaðarráðið kann geva politiska myndugleikanum sínar tilráðingar, um hvat partarnir á arbeiðsmarknaðinum halda vera at gera.

**Endamálið við hesum uppskotunum**

Við eini nýggjari semingslóg, einum víðkaðum gerðarrætti og einum arbeiðsmarknaðarráði fær føroyski arbeiðsmarknaðurin góð amboð at skipa síni viðurskifti, bæði viðvíkjandi bráðfeingismálum og viðvíkjandi framrættaðum og langtrøkkandi málum. Endamálið við hesum uppskotinum er tí stutt tað, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum skulu hava bæði ábyrgd, amboð og umstøður til sjálvir at loysa allar ósemjur sínámillum og skipa síni egnu viðurskifti.

Casablanca Ristorante
Hugnalig nýggj Italiensk matstova
Vel millum 30 fjølbroyttar:
Forverðar, suppur, pasta, pizza, fiskaverðar, kjøtverðar, barnamenu og dessertir
Opið er frá kl. 12.00
Borðbílegging á tlf 31 96 96
Casablanca Ristorante

Í Býin

Shanghai
Bíleggið borð á telefon 223000 ella 457680

BAROK

Í Býin

AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-
Hýra bil - ring 311234
BENZIN DIESEL KIOSK
AUTO 311234

Vit hava m.m.a.
Rista Baguette 42,-
v/ ost & skinku
v/ ost & kalkun
Baguette 45,-
v/ kylling & bacon
v/ost & skinku
v/ost & kalkun
livandi tónleikur
CAFÉ NATÚR
Tlf. 31 26 25
Sosialurin 311820



petur & petur • 320870
fríggjakvøldið 4/01
Eyðun & Terji LIVE
og Discoteque
leygarkvøldið 5/01
Discoteque
20 ára aldursmark
PLATFORM discoteque

Vilja tygum við Í Býin
J.-hvønn hósdag

Hafnia Lounge
Mánadag - hósdag
Opið kl. 14.00-24.00
Servering steðgar kl. 23.30
Fríggjadag & leygardag
Opið kl. 14.00-01.00
Servering steðgar kl. 00.30
Sunnudag
Opið kl. 17.00-24.00
Servering steðgar kl. 23.30
Hotel Hafnia
Tlf. 31 32 33 · Fax 31 52 50





fk Matseðilin
Hósdagin 3. jan.: Saltkjøt
Fríggjadagin 4. jan.: Kotelettir
Leygardagin 5. jan.: Rullusteik
Mánadagin 7. jan.: Medistarpylsa
Týsdagin 8. jan.: Stokt flesk
Mikudagin 9. jan.: Hakkibúffur
***
Seinnaparts-TILBOÐ frá kl. 14.00:
Juniorburgari 19,95
Maxiburgari ella Búffsandwich 25,00
Matstovan í Hoyvík

Klubbadansur
DRIV spælir
Havnar Klubbi: staðið, har fólk møtir áðrenn tað er tíð at fara heim
HK Havnar Klubbi Stovnaður 1799
Sosialurin - 311820

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið :
• Vetsm.-Tórsh. kl. 23.30
• Tórsh.-Vetsm. kl. 00.30
• Vetsm.-Tórsh. kl. 03.30
• Tórsh.-Vestm. kl. 04.30
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir: Tlf. 286254

Felagið Tórshøll
Hetta vikuskiftið spæla
FLÚRAR
Hvørt fríggjakvøld, leygarkvøld og sunnukvøld er livandi tónleikur
NÝGGJÁRSBINGO
verður leygarkvøldið kl 20:00
fleiri ódyrar eindir allar dagar
Felagið Tórshøll Sverrisgøta 22 Tlf. 31 15 65

Í Býin

Lesið Sosialin

Klaksvíkar Klubbi
Tlf. 455681

Í BÝIN
- hvønn hósdag